LM-104/2023

TÓRSHAVN 15. APRÍL 2024

FØROYSKIR FISKIMENN UTTANLANDS, FFU



NEVNDIN Í FØROYSKIR FISKIMENN UTTANLANDS

ÍSKOYTI

FRÁGREIÐING

AVTØKA AV § 154 B FRÁDRÁTTINUM

(Avtøka av frádrátti í skattinum fyri sosial gjøld uttanlands fyri tey, ið arbeiða uttanlands)

Búskaparligar, formligar og aðrar avleiðingar
- og møgulig loysn

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

INNIHALD

SAMANUMTØKA OG TILMÆLI 3
VIRKSEMI HJÁ FØROYINGUM Í STARVI UTTANLANDS 4
Føroyingar við útlendskum fiskiskipum og lønarinntøka 4
Avleitt vinnuligt virksemi í Føroyum frá útlendskum fiskiskipum 4

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

SAMANUMTØKA OG TILMÆLI

Rættuliga stórt vinnuligt virksemi er í Føroyum, ið hevur beinleiðis tilknýtið til føroyskar fiskimenn, sum sigla við útlendskum fiskiskipum, t.d. norsk, grønlendsk, kanadisk og donsk skip. Størsti parturin av innkeypinum hjá útlendsku skipunum í Føroyum er fiskireiðskapur, t.d. trol og trollemmar - umleið 150 mió. kr. árliga. Søla av øðrum vørum og tænastum eru umleið 30 mió. kr. frá olju og umleið 30 mió. kr. frá umvælingum, havnagjøldum o.a. Tilsamans er talan um 210 mió. kr. árliga. Harafturat koma tær lønarinntøkur, sum føroyskir fiskimenn uttanlands útvega til føroyska samfelagið, umleið 165 mió. kr.

Sostatt er talan um heilar 375 mió. kr. frá sølu og lønarinntøkum, sum hesi fiskiskip við føroyskari manning leggja eftir seg í Føroyum. Hesar avleiddu inntøkur og lønir standast einans av tí, at føroyskir fiskimenn eru við til at manna hesi útlendsku fiskiførini, antin sum yvirmenn og/ella dekkarar. Hetta merkir so aftur, at flyta ella gerast hesir fiskimenn færri í tali, so fær tað tilsvarandi neiligar avleiðingar fyri avleitt vinnuligt virksemi o.a. í Føroyum.

Frágreiðing - Avtøka av § 154 B frádráttinum

VIRKSEMI HJÁ FØROYINGUM Í STARVI UTTANLANDS

Føroyingar við útlendskum fiskiskipum og lønarinntøka

Talið á føroyskum fiskimonnum uttanlands er umleið 170.

Hetta lutfalsliga stóra talið á føroyskum fiskimonnum uttanlands merkir, at bara hesin bólkurin forvinnur yvir 136.000.000 kr. í lønarinntøku til samfelagið Føroyar, hetta við t.d. einari miðal inntøku upp á 800.000 kr. árliga. Í veruleikanum er hetta tal eitt sindur hægri, men sveiggjar annars frá til ár.

Síðan kemur talið á føroyskum fiskimonnum, sum gjalda skatt av sosialum gjøldum frá NF og MPK.

Avleitt vinnuligt virksemi í Føroyum frá útlendskum fiskiskipum

Tað er eitt rættuliga stórt vinnuligt virksemi í Føroyum, ið hevur beinleiðis tilknýtið til føroyskar fiskimenn, sum sigla við útlendskum fiskiskipum, t.d. norsk, grønlendsk, kanadisk og donsk skip. Í talvu 1 er gjørt eitt yvirlit, sum vísir hetta virksemið og býtið av árliga innkeypinum í Føroyum hjá útlendskum fiskiskipum av vørum og tænastum. Afturat hesum vinnuliga virkseminum, skal leggjast tær lønarinntøkur, sum hesir somu fiskimenn útvega til føroyska samfelagið (talan er um metingar).

Talva 1. Avleitt vinnuligt virksemi í Føroyum frá útlendskum fiskiskipum
Kelda: Vónin, Rock Trawl-doors, Taks og egnar metingar

Framleiðsla og tænasta (mió. Dkr.)	**Upphædd, árliga**
Fiskireiðskapur - skapar nógv arbeiðspláss og lønartungt	150
Olja	30
Umvælingar, havnagjøld o.a.	30
Tilsamans	**210**
Lønarinntøkur frá føroyskum fiskimonnum uttanlands 2022	165
Tilsamans	**375**

Viðmerking
Søla av fiskireiðskapi er grundað á miðaltøl.

Talva 1 vísir m.a., at størsti parturin av innkeypinum í Føroyum hjá útlendsku fiskiskipunum, er fiskireiðskapur, t.d. trol og trollemmar, ávikavist frá feløgunum Vónini og Rock Trawl-doors - umleið 150 mió. kr. árliga. Søla av øðrum vørum og tænastum eru umleið 30 mió. kr. frá olju og umleið 30 mió. kr. frá umvælingum, havnagjøldum o.a. Tilsamans er talan um heilar 210 mió. kr. árliga.

Harafturat hesum vinnuliga virkseminum koma tær lønarinntøkur, sum føroyskir fiskimenn uttanlands útvega til føroyska samfelagið, umleið 165 mió. kr. árliga.

Sostatt er talan um heilar 375 mió. kr. frá sølu og lønarinntøkum, sum hesi fiskiskip við føroyskari manning leggja eftir seg í Føroyum. Hesar avleiddu inntøkur og lønir

standast einans av tí, at føroyskir fiskimenn eru við til at manna hesi útlendsku fiskiførini, antin sum yvirmenn og/ella dekkarar. Hetta merkir so aftur, at flyta ella gerast hesir fiskimenn færri í tali, so fær tað tilsvarandi neiligar avleiðingar fyri avleitt vinnuligt virksemi o.a. í Føroyum.